gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Avtalubrot!

Hóskvøldið boðaði formaðurin í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta Petersen, frá, at felagið umhugsar at seta tiltøk í verk, tí Fíggjarmálastýrið heldur ikki ein avtalu, sum partarnir gjørdu fyri einum ári síðani. Hetta kom fram, nú Løgtingið viðgjørdi uppskot um eina eykajáttanarlóg. Eftir skjølunum hevur Mentamálastýrið biðið um stívliga átta milliónir krónur afturat til fólkaskúlan fyri komandi skúlaár.

Men á sjálvum uppskotinum, sum varð samtykt við 2. viðgerð hósdagin, hevur Fíggjarmálastýrið bara sett hálvaaðru millión krónur á. Tað merkir, at nú koma útvið sjey milliónir krónur at resta í. Fær fólkaskúlin ikki henda peningin, fær tað álvarsligar avleiðingar fyri komandi skúaár, tí tað fer at mangla peningur til fleiri hundrað skúlatímar. Aftur eitt dømi um, at tað var ikki rætt at seta nýggju fólkaskúlalóg í gildi, uttan at peningur fylgdi við, sum m.a. Signar á Brúnni vísti á, tá Fólkaflokkurin skoraði á at fáa lógina samtykta í 1997.

Hóast tað er Fíggjarmálastýrið, sum brýtur semjuna við Lærarafelagið, er skurkurin tó at finna í Mentamálastýrinum, tí Karsten Hansen og Høgni Hoydal, táverandi landsstýrismaður í skúlamálum, avtalaðu, at Mentamálastýrið skuldi finna peningin á sínum øki til semjuna við Lærarafelagið. Men tað hevur eftirmaðurin, Torbjørn Jacobsen, ikki gjørt.

Við øðrum, sum sum Javnaðarflokkurin ásannar í áliti sínum: "Fíggjarmálastýrið, við vælsignilsi frá Mentamálastýrinum, er longu nú lopið frá avtaluni frá 30. apríl 2000 og er ikki sinnað at halda sínar skyldur, uttan at virksemið í fólkaskúlanum komandi skúlaár verður munandi skert á øðrum økjum."

Tað er átaluvert, at tað verður hildið fram at niðurpína fólkaskúlan - ein niðurpíning, sum fer at hava so mikið álvarsligar avleiðingar, at skúlin møguliga fer at mangla eina 800 tímar!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Blokkstuðulshugmóð

**Thomas Arabo**
*Kollafjørður 26. apríl 2001*



Blokstuðulsavtalan sum vit nú hava er umleið 10 ára gomul. Avtalan gongur í stuttum út uppá at Danmark gjaldar eina upphædd á einum ávísum støði - í løtuni umleið eina milliard um árið - til landskassan. Í praksis fara hesir pengar inn í landskassan á sama hátt sum skattir og avgjøld.

Avtalan við ríkið sigur eisini at um olja verður funnin við Føroyar í lønandi nøgdum so skal spurningurin um støddina av blokkinum takast upp av nýggjum.

Fyrstu árini var blokkurin ov lítil og fyri at fáa landshúsarhaldið at hanga nøkulunda saman var neyðugt við nógvum avgjøldum og skattum.Sostatt var avtalan tá til fyrimuns fyri danska statskassan.

Seinastu árini hevur avtalan verið til fyrimuns fyri tann føroyska landskassan, so ein fittur partur av blokkinum er farin inn á bók í landsbankanum. Tann parturin, íð har stendur, hvørki avskeplar ella upphitar nakran búskap so pástandir um naka slíkt er svass og vrøvl. Vóru pengarnir nýttir til dagligan rakstur av landinum so var myndin ein onnur.

Nú sær út til at Landsstýrið ætlar at biðja um at fáa blokkstuðulsavtaluna broytta til fyrimuns fyri danska statskassan. 400 miljónir skulu skerjast av intøkusíðuni hjá landskassanum ella um tað ljóðar betur so skulu 400 miljónir játtast til yvirtøku av skúlamálum. Í mínum oyrum ljóðar hettar stein ørt, tí í skulamálum hava vit haft ræðis og lóggávurætt í nógv harrans ár, so hendan yvirtøkan ger hvørki frá ella til um vit skulu tosa um meira frælsi ella sjálvbjargni.

Sjálvur haldi eg at vit skulu ganga sjálvstýrisleið og uppá sikt umsita hettar landið sjálvir. Hevði huga mær til at vit - nú umstøðurnar til tað eru tær frægastu í nógv ár- fóru at yvirtaka nøkur málsøkir,sum vóru undir donskum ræði og gjalda tað sum tað kostaði. Við at skerja intøkusíðuna hjá landskassanum so kann tað skjótt blíva ein trupuleiki at skaffa fígging til slíkar yvirtøkur.

At siga nei til sáttmálabundnar kontantar pengar er hugmóð. Í nógv umrøddu 80 unum hildu føroyingar at alt helt framm bara at ganga upp eftir og okkara fíggjarverð koyrdi fínt uttan at verða ávirka av teimum kreppum íð leikaðu á úti í heimi. Vit blivu klókari - ella blivu vit nú tað?

Eg haldi at verandi blokkstuðulsavtala skal haldast og hasar 400 miljónirnar um árið, íð ætlanin er at geva danska statskassanum, skulu nýtast til íløgur til frama fyri føroyska samfelagið og gera tað so nýmótans og kappingarført sum tað yvirhøvur ber til.

Nógv er at taka fatur í. Og nógvar av hesum íløgunum hita ikki føroyska búðskapin eitt einasta vet, men styrkja bara samfelagið enn og meir. Og so eitt afturat, um vit ikki gera hesar íløgur fyri teir pengar vit hava fullan ræðisrætt á nú, so kemur rokningin fyrr ella seinni at liggja á borðinum hjá vinnuni tí har er tað einasta staði at fara !

Eg kann nevna nakrar í løgur íð við stórari vissu koma í nærmastu framtíð :

Einar 150 - 200 miljónir verða at játta eyka til Vága og Norðuroya berghol, tí vágafólk og norðoyingar ikki fara at finna seg í at teir sum teir einastu í landinum skulu gjalda vegagjald.

Nýtt suðuroyasamband við øllum- einar 300 til 400 miljónir.

Íløgur í fjarskiftissamband fyri 100 tals milliónir. Neyvan realistiskt at hugsa at vinnan sjálv maktar hesa uppgávuna uttan at landið meðfíggjar fyri at halda eina hampuliga príslegu og hampuliga íløguferð.

Og so íløgurnar í heilsuøki - aftur stór tøl

Og útoyggjagrunnurin ikki at forgloyma !.

Sostatt síggi eg ikki tað snilda í at forera dønum 400 miljónir um árið tá íð vit kunnu betra um okkara samfelag heilt munandi uttan at skatleggja okkara egna fólk og uttan at upphita nakran búðskap óforsvarliga nógv.

Viðvíkjandi sjálvstýristilgongdini so vilja vit eisini framhaldandi hava ráð til at fremja nakrar yvirtøkur og ganga hesa leið á ein skilagóðan hátt og altíð hava í huga orðatakið : Frá høvdinum skal tú hvalin skera o. sfr.

Hatta orðatakið hevur ikki havt gildið í núverandi sjálvsstýristilgongd

Tvørturímóti!

# Almennur fyrilestur

TÍÐINDASKRIV

Almennur fyrilestur verður á Føroyamálsdeildini hóskvøldið 3. mai 2001 kl. 20.

Malan Marnersdóttir, lektari, dr.phil., heldur fyrilestur, ið hon kallar: Millum tekstir.

Malan Marnersdóttir er lektari á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum.

Fyrilesturin er um skaldsøguna Undir suðurstjørnum eftir Gunnar Hoydal við støði í doktararitgerðini, sum hon vardi 1. desember 2000 á Aarhus Universiteti.

Skaldsøgan er eitt gott dømi um nútímans skaldsøguskriving. Í fyrilestrinum verður greitt frá samansetingini og frásagnarháttinum, sum er fjølbroyttur sambært eini ávísari ætlan. At enda verður víst á viðurskifti millum skaldsøguna og aðrar bókmentir. Verk hjá øðrum høvundum búgva í tekstinum hjá Gunnari Hoydal, tekstirnir taka hvør frá øðrum og læra hvør av øðrum.

Undir suðurstjørnum er ein týðandi skaldsøga og stendur fyri eini vend í ritverkinum.

Sí eisini heimasíðuna www.setur.fo/almen.html


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Yvirlýsing frá Útnorðurráðnum

**ÚTNORÐURRÁÐIÐ**
**Landstingsformaður**
**Ole Lynge, formaður**

Hvussu kann eitt menniskja fáa seg til at drepa ein kóp? Hvussu ber tað til, at menniskju drepa grind? Spurningar, sum hesir, eru vanligir millum fólk, ið eru uppvakin í stórbýum kring um í vesturheiminum. Fyri fólk í útnorði leiða tílíkir spurningar tó ikki til størri undran enn spurningurin um, hvussu nakar kann drepa eina kúgv ella eitt svín.

Í útnorði - sum er Ísland, Føroyar og Grønland - er siðvenja at veiða havsúðdjór.

At eta hvala- ella kópatvøst fellur okkum eins sjálvsagt, og tað fellur øðrum at eta svínakjøt, oksakjøt og ymiskan flogfena. At klæða okkum í ein kópaskinsfrakka er eins náttúrligt sum at nýta kálvaskinn ella oksaleður.

Veiðan er ein lutur í mentan okkara. Hon hevur sett sín avgjørda dám á okkara matvanar, okkara søgu og samleika. Somuleiðis hevur hon altíð verið ein partur av okkara tilerugrundarlagi. Tá veiðan hevur svikið, hava grýturnar mangan staðið tómar, og sjálvt í dag er veiðan fyri mong okkara eitt neyðugt ískoyti til lívsins uppihald.

Veiða er nakað serstakt, ið knýtur okkara fortíð saman við tíðini, vit liva í. Vit minnast hvussu tey, sum undan fóru, komu heim til húsa við fugli úr bjørgunum og kópum frá fyrðunum. Minnið um, tá vit á fyrsta sinni sluppu við at veiða, hvussu errin ein var, hvussu leikur fór fyrstu ferð, tú drapst eitt djór og harvið vart við at breyðføða familjuna.

Samstundis knýtur veiða fólkið í smáu samfeløgunum í útnorði saman í ein mentanar- og áhugafelagsskap. Frá gamlari tíð er tvøst býtt út til bygdarfólkið, og framvegis í dag fær gamal sum ungur eitt serligt andlitsbrá, tá grindaboð eru at hoyra.

Fyri fólkið í útnorði er veiða ein spurningur um at yvirliva og samstundis ein spurningum um aldargamlan mentanararv. Henda mentanararv ynskja vit at varða um og varðveita. Fleiri viðurskifti hótta tó veiðusiðvenjuna í útnorði:

Vandin fyri ov stórum veiðutrýsti er ein varandi hóttan móti stovnunum. Um veiðan ikki verður framd á ein burðardyggan hátt, verða djórsløg hótt, og møguleikarnir hjá komandi ættarliðum hvørva.

Virðingin fyri náttúruni hevur tó í nógv ættarlið eyðkent veiðumentanir í útnorði, samstundis sum fólkið í útnorði altíð hevur verið heft at náttúruni. Stuttskygdur grammleiki er nakað, sum fólkið í útnorði ikki kann loyva sær.

Ovveiða av ávísum stovnum er sostatt ikki størsta hóttanin móti veiðusamfeløgunum í útnorði. Lívfrøðingar halda neyvt eyga við stovnunum, og friðingar, kvotur o.a. verður ásett við vegleiðing frá serfrøðingum og vit atliti at burðardyggari veiðu.

Dálking er á mangan hátt ein størri hóttan móti veiðumentanini í útnorði. Tungmálmur og onnur eiturevni savnast í veiðudjórunum og hótta virðið av hesum sum mannaføði. Eisini livivánirnar hjá djórunum verða hóttar av dálking. Tað er torført hjá útnorðurlondunum einsamøll at gera nakað við eina tílíka hóttan. Tílík dálking hevur eingi mørk, og vit kunnu bert heita á ídnaðarlondini um at vísa hóvsemi og ábyrgd og framhaldandi royna at avmarka mongdina av umhvørvisskaðiligum evnum.

Misskiljingar og manglandi vitan til viðurskiftini í útnorði hava til tíðir eisini verið ein hóttan móti veiðumentanini í útnorði. Átøk móti kópaveiðu í Grønlandi, søkking av íslendskum hvalaskipum og tiltøk móti føroyska grindadrápinum eru dømi um hetta.

Hesi dømi vísa á týdningin av at hava eitt gott samskifti við umhvørvis- og djóraverndar-felagsskapir. Vit mugu sleppa undan, at íspunnar søgur og skeivar metingar seta dám á kjakið.

Stovnsvernd og vernd av havumhvørvinum eru mál fyri okkum øll - ikki minst fyri útnorðurlondini, ið fult og heilt eru heft at náttúruni og tí, hon hevur at bjóða. Vit síggja umhvørvisfelagsskapir sum okkara samstarvsfelaga. Okkara áhugamál er til allar tíðir at arbeiða fyri, at neyðug og álítandi vitan kemur fram um stovnarnar og teir vandar, sum hótta teir.

Útnorðurráðið hevur valt, at 2001 skal verða veiðuár. Tað er ábyrgd ráðsins at syrgja fyri, at ljós verður varpað á veiðumentanirnar í útnorði og harvið vera við til at upplýsa um okkara aldargomlu siðvenju fyri burðardyggari veiðu, sum enn er ein livandi partur av samfeløgunum. Vit ynskja samstundis at varpa ljós at tey viðurskifti, sum hótta hesa siðvenju.

Víst drepa vit kóp, og víst drepa vit hval - vit liva av náttúruni. Júst tí er eingin, ið hevur størri áhuga í varðveitsluni av einari reinari og burðardyggari náttúru, enn vit.

*Útnorðurráðið er ein samstarvsfelagsskapur millum tingini í Grønlandi, Íslandi og Føroyum.*

*Ráðið hevur valt 2001 at verða veiðumentanarár.*

*Í hesum sambandi verður skipað fyri ráðstevnu um veiðu á Akureyri 11. - 14. juni 2001.*

# Spírandi ungdómur vanvirdur av Sosialinum!

**Eva Brekkstein**

Fríggjadagin 27. apríl var Músafellan, sum Spírar framføra í Sjónleikarhúsinum í Havn, ummæld í Sosialinum, helst av næmingum í starvsvenjing. Alt gott um tað, ið var skrivað, tí bæði pallur, leikarar, ljós- og ljóðgóðska fingu framúr gott ummæli, og tað hava tey í Spírum so avgjørt uppiborið.

Men...er tað ikki at vanvirða spírandi ungdóm, ið hevur gjørt eitt gott arbeiði við at skapa nakað, at ummæla leikin dagin eftir ætlaðu síðstu sýning? Myndin, ið nýtt er saman við ummælinum, er eitt atgongumerki, har tað sæst, at ummælarnir hava verið til leikin frumframførslukvøldið 16. apríl. So hetta ummæli átti at komið í blaðið beint eftir frumframførsluna, tí hvat skulu vit lesa eitt ummæli til, tá vit ikki hava møguleika at síggja leikin? (um vit altso ikki langt síðan hava sæð hann!!) So er bara at vóna at eykasýningar verða, ella at leikurin verður tikin upp aftur seinni.

Eg havi hug at halda, at grundin til, at Músafellan ikki hevur verið ummæld í Sosialinum fyrr enn nú, er, at Sosialurin als ikki var til frumframførsluna, hóast hann fekk innbjóðing. Tí tað tekur neyvan 10 dagar at skriva eitt ummæli. Bíðað var bara eftir at fáa næmingar í starvsvenjing, so at teir kundu taka sær av tí.

Vit kunnu tó gleðast um, at leikurin hóast alt er ummældur - betur seint enn ongantíð!

# Innsavnan til hjálpararbeiði í Rumenia

TÍÐINDASKRIV
*Rumenia-Hjálpin*
*Samkoman Immanuel*

Seinastu 6 árini hava Durita og David Dam Jacobsen virkað sum trúboðarar í Rumenia. Tey eru útsend av Samkomuni Immanuel í Hoyvík og eru í hesum døgum á vitjan í Føroyum og vilja tey m.a. royna at savna pening inn til høli, sum skulu hýsa hjálpararbeiði og samkomu í stórbýnum Timisoara Rumenien.

Hesi árini, tey hava verið í Timisoara, er ein samkoma, sum í dag telur 60 fólk, sett á stovn, og er eisini stovnaður ein hjálparfelagsskapur við stórum virksemi innan tey fátæku í landspartinum Timis.

Higartil hava samkoman og hjálparfelagsskapurin húsast í húsinum, sum Durita og David hava búð í. Møtisalurin og sunnudagsskúlarúmini eru vorðin ov smá og vegna tað støðugt vaksandi virksemi, kann hjálparfelagsskapurin ikki longur húsast á loftinum í húsinum. Talið á umsóknum um hjálp veksur og uppringingarnar hava ongantíð verið fleiri enn tær eru nú. Nevnast kann at í 1998 vóru umleið 2,5 tons av hjálparvøru givin út, í mun til umleið 11,5 tons í ár 2000. Goymslurúmið á loftinum kann ikki longur rúma tí vaksandi mongd av hjálparvøru, ið kemur úr Føroyum.

Fyritøkur og privatfólk hava verið ógvuliga trúføst og hjálpsom at stuðla hjálpararbeiðnum við klæðum, skóm, vaskievni, mati og øðrum, sum Samkoman Immanuel síðani hevur koyrt við bussum yvir til Rumenia. Men vegna plásstrot kann arbeiðið ikki halda fram, um ikki størri høli fáast til vega og vóna vit tí, at fólk og fyritøkur eru áhugað í at stuðla við eini peningagávu, so at arbeiðið kann koma at nøkta til fulnar tann vaksandi tørvin.

Ymisk tiltøk fara at verða fyri at samla inn pening. M.a. fer Rás 2 at skipa fyri einum »live-kvøldi« leygarkvøldið 5. mai, har fólk hava høvi til at ringja inn og lata eina peningagávu. Í komandi viku fer Rumenia-Hjálpin at ringja runt til fyritøkur og hava tey, ið eru áhugað, høvi at lata eina peningagávu. Eisini verða onnur smærri tiltøk so sum køkutombola, kappingar og annað.

Um so skuldi hent, at ov lítið av peningi kemur inn, ella at óvæntaðar umstøður steðga byggingini, verður peningurin óskerdur settur til síðis at hjálpa fátækum í Rumenia.

Vit takka framman undan fyri vístan áhuga.



*Durita saman við rumenskari kvinnu, ið júst hevur fingið eitt par av skóm úr Føroyum*